# Herðaklapp til tvey róðrarfeløg í Norðoyggjum

**Kappróður:** Um vikuskiftið var skipað fyri summarstevnu í bygdunum fram við Hvannasundi. Stevnan ber heitið Norðoya Summarstevna.

Á stevnuni vóru øll tey tiltøk, sum hoyra til eina slíka stevnu innan t.d. ítrótt, barnatiltøk, dans og aðrar kappingar.

Á skránni var eisini eitt tiltak, ið ikki beinleiðis hevði við ítrótt at gera, men sum kortini hevur tað.

Leiðslan í Norðoya Sparikassa hevur nevniliga avgjørt at verða sponsor hjá tveimum av kappróðrarfeløgunum í Norðoyggjunum – Norðdepils/Hvannasunds Róðrarfelag og Árnafjarðar Róðrarfelag.

Og hvat var betri høvi at undirskriva hetta enn á sjálvari stevnuni. Og tað varð so gjørt seinnapartin sunnudagin.

Fyri feløgini bæði man hetta vera eitt sera gott herðaklapp, sum fer at gera tað meiri spennandi at halda á við kappróðrinum eisini í framtíðini.

Og hvør veit – kanska gera bátarnir í feløgunum ein vørr á ólavsøku?

**sb.**



*Kappróðrarfelagið í Hvannasundi fingu herðaklapp frá peningastovni*

# Ólavsøkugudstænasta eisini í Keypmannahavn

**Gudstænastur:** Annað árið á rað verður gudstænastan hildin í Vor Frelsers Kirke ólavssøkudag kl. 18. Í fjør varð farið undir at halda ólavssøkuna á Bryggjuni, har føroyska sendistovan hevur til húsa. Og við tað at bryggjan liggur í Vor Frelsers sókn, var avgjørt at halda ólavssøkuguðstænastuna í hesi kendi kirkjuni á Christianshavn, har sjálvur N.F.S. Grundtvig hevur verið prestur. Hettar er kirkjan við tí eyðkenda gylta spírinum.

Í ár prædikar Borgny Johannesen. Hon er ættað úr Dali, og er prestur í Seest í Jútlandi.

Bergur Jacobsen prestur, sum skipar fyri ólavssøkuguðstænastunum í Keypmannahavn, hevur hesa ferð býtt prædikustólin um við urguloftið, og fer at spæla trompet afturvið sálmasanginum. Nýggir tónar til gomul løg verða eisini at hoyra. Anna Maria Olsen og Stamen Stanchev fara at syngja og spæla kingoløg í serligum hami.

Í ár verður prædikað eftir fyrru tekstarrøð, um tað at fylgja Jesusi eftir. Og sum siður er, endar guðstænastan við at meinigheitin reisir seg og syngur tjóðsangin.

Aftana guðstænastuna, ið endar umleið kl 19, verða ymisk tiltøk á bryggjuni.



*Vor Frelsers Kirke verður karmur um føroyska gudstænastu á ólavsøku á danskari jørð*

# Fá atgongumerki eftir til Summar Festivalin

**Klaksvík:** Teir báðir stóru tónleikafestivalarnir í Føroyum, G! Festivalurin og Summar Festivalurin, hava rættiliga fingið vind í seglunum. Fyrireikararnir av G! noyddust fríggjakvøldið at boða frá, at útselt var til festivalin.

Hetta hevur fingið fólk at spyrja, hvussu tað er statt við atgongumerkjum til Summar Festivalin, sum verður í næstum.

– Vit hava havt eina óvanliga stóra forsølu í ár, men tað gongur spakuliga undan við atgongumerkjum, hóast tað eru tvær vikur til festivalin.

- Vit hava nøkur hundrað atgongumerki eftir at selja í forsølu, og vit rokna við, at tað kann blíva útselt nakað áðrenn festivalin, siga fyrireikararnir.

Fyrsti Summar Festivalurin eydnaðist væl, soleiðis at áhugin fyri festivalinum í ár er sera stórur. Harafturat hava teir eisini fingið fleiri stór útlendsk nøvn at spæla, og alt hetta gera uttan iva sítt til, at forsølan hevur verið so umfatandi.

# - Beatles er oysini mentan

**Stanley Samuelsen hevur havt úr at syngja hesar dagarnar, hann hevur verið í Føroyum. Um vikuskiftið spældi hann ikki færri enn tríggjar ferðir á størri og smærri tiltøkum.**

TÓNLEIKUR
*Snorri Brend*

Hóskvøldið kundu tey uppliva Stanley í Glitnir. Fríggjakvøldið sang hann í Miðlahúsinum í Vágsbotni og leygarkvøldið var hann ein av luttakarunum á G-festivalinum í Gøtu.

Fríggjakvøldið var veðrið av tí fagrasta, men hetta forðaði kortini ikki fleiri enn 40 áhoyrarum at seta tveir tímar av at lurta eftir kenda sangfuglinum.

Á hesi tøttu konsertini sang hann fleiri kendar sangir, men eisini kendar yrkingar, sum hann sjálvur hevur sett løg til.

Hetta vóru sangir eru so frægar menn sum Janus Djurhuus, Hans A. Djurhuus, Rasmus Effersøe, Andras Samuelsen, Finn Kalvik og aðrar.



*Stanley syngur og undirheldur sum fáur, bæði tá talan er um størri konsertir – og sum her, tá áhoyrarnir eru færri*

## Forelskaður maður

Ein av sangunum hann sang var sangurin "Go tellin' what a lovesong can do".

Hetta var sangur eftir eina sum kallaðist Linda Thomson, og sum hann hevði hoyrt í útvarpi, eina fer hann var á heimleið úr Noregi til Danmarkar.

Útvarpið stóð frá, og tá hoyrdi hann brádliga ein bera fram henda sera vakra sangin, um ein mann sum í ringum hýri fór inn á eitt vertshús. Her fekk hesin maðurin samband við eina kvinnu, og gjørdist rættiliga forelskaður í henni.

- Og tá hann fór út aftur, var hann vorðin til ein glaðan mann, segði Stanley.

Honum dámdi sangin so væl, at hann mátti steðga bilinum fyri at fáa allan tekstin í sanginum við, og fyri at vita, hvør tað var sum hevði skrivað hann.

Hann hevði eisini funnið eina yrking í einum føroyskum blaði eftir kvívíking, sum vaktu barnaminni hansara úr Fuglafirði. Yrkingin kallaðist "Horvin kvøldsmynd" og var um tað, sum sermerkti gamla føroyska bygdarlívið.

- Hetta minti meg so nógv um gamlar dagar í Fuglafirði, har menn mangan savnaðust Nirði á Hjørni til eina hugnaliga løtu og eitt gott prát.

- Í dag er hetta bert minnir, segði Stanley, áðrenn hann sera inniliga frambar hesa yrkingina.

Hann sang tó eisini kendar sangir, og áhoyrarafjøldin livdi rættiliga við - og sang væl við - tá hann sang kenda Beatles-lagið "Nowhere Man".

Tað var í samband við henda sangin, at hann avgjørdur sló fast við síni fuglfjarða-dialekt, sum enn hoyrist á málinum, hóast búsettur í Danmark:

- Beatles er oysini mentan!

Og tað er Stanley eisini!

# Tey eldru siga sína hugsan um framtíðina

**Í hesum døgum fáa komandi pensiónistar í Føroyum, Norra, Svøríki og Finlandi høvi at geva sína áskoðan um eldraøkið í framtíðini til verkætlanina "Okkara Lív sum Eldri". Talan er um tilvildarliga vald fólk í aldrinum 55-65 ár, sum hava fingið spurnarblað sendandi við ymsum spurningum um, hvussu tey kundu hugsað sær umstøðurnar í framtíð. Tvær føroyskar kommunur eru við í ætlanini.**

ELDRAPOLITIKKUR

Við spurnarblaðinum fær verkætlanin svør við ymsum spurningum innan fyri tey seks økini arbeitt er við.

Hesi fevna um bústaðir, heilsutænastur, familju, starvsfólk og rekrutering, tænastur til eldri og netverk. Tað verður sera áhugavert at finna út av, hvørjar áskoðanir eru felags í øllum londunum og ikki minni áhugavert at staðfesta hvør munurin er.

## Familja og bygdasamfelag

Ymist er, hvat londini leggja størstan dent á at fáa upplýsingar um, og hetta vísir seg eisini í ábyrgdarbýtinum í verkætlanini.

Føroya Kommunufelag hevur ábyrgdina av partinum um familjuna. Føroyar eru av størstum áhuga hvat hesum viðvíkur, vegna tað tætta sambandið familjan og bygdasamfelagið hevur. Í Norður Skotlandi, sum eisini luttekur í verkætlanini, eru viðurskiftini lík teimum í Føroyum.

Har hava tey tó trupulleikar av at pensiónistar flyta úr stórbýunum í Englandi til bygdasamfelagið í Skotlandi, tí tey meta at umstøðurnar eru tryggari har. Tilflytararnir fáa ofta trupulleika við at falla til í nýggja umhvørvinum og stovna nýggj sambond.

Okkara samstarvsfelagar í Norðanlondum og Skotlandi kunnu allir vísa á einsemi millum tey gomlu í dag. Her í Føroyum verður hin vegin hildið, at familjan er so stórur partur av gerandisdegnum, at hetta kanska ikki er eitt vandamál. Hetta er eitt av tí sum ætlanin er at fáa lýst í verkætlanini.

Sunda Kommuna og Vestmanna Kommuna eru pilotkommunur í verkætlanini. Í hesum kommunum hava 200 íbúgvar móttikið spurnarblaðið og fáa við hesum høvi at ávirka sína framtíð sum pensionistar.

# Fleiri bilverkstøð fingið átalu

**Arbeiðseftirlitið hevur kannað fleiri bilverkstøð kring landið. Og úrslitið bendir á, at hóast hetta so er støðan á verkstøðunum í batningi.**

BILEFTIRLIT
*Snorri Brend*

**Bilverkstøð:** Í ár hava fólk frá Arbeiðseftirlitinum verið kring landið og vitjað fleiri bilverkstøð - íalt 48. Her er talan um verkstøð, har fólk er í starvi hjá einum arbeiðsgevara.

Undir vitjanini vórðu kannað ymisk viðurskifti í samband við bygningar, tól og arbeiðsumstøður.

Av hesum 48 bilverkstøðunum, sum vitjað vórðu, vóru átaluverd viðurskifti staðfest hjá 17 teirra.

Hinvegin so vísir kanningin, at støðan er batnað nógv seinastu átta árini.

Eitt líknandi átak varð gjørt í 1997, og vísir tað seg nú at støðið er munandi betri. Bert í einstøkum førum var talan um fleiri boð til sama virki.



*Støðið á føroysku verkstøðunum er vorðið munandi betri seinastu árini*

*(Tilvildarlig mynd)*

- Hetta kundi bent á, at átakið í 1997 hevur gjørt mun, og at fyritøkurnar leggja dent á eitt gott arbeiðsumhvørvi, sigur Arbeiðseftirlitið eftir kanningar sínar.